## Stór tuberklakanning

Í Grønlandi hevur landsstýrið gjørt av at fara undir eina umfatandi kanning fyri at fáa staðfest, um grønlendsk skúlabørn eru smittað við tuberklum. Í hesum sambandi fáa allir næmingar í 1. og 10. flokki í øllum Grønlandi tilboð um at taka eina blóðroynd, sum skal brúkast til at finna møguliga smittu. Kanningar fyrr hava avdúkað, at lutfalsliga nógv skúlabørn í Suðurgrønlandi eru smittað við tuberklum, sigur landsstýrið í tíðindaskrivi.



*Nú skulu tey yngstu og tey elstu grønlendsku skúlabørnini kannast fyri tuberklar*

*(Mynd: KNR)*

## Taka kanningina uppaftur

Løgreglan í Nuuk fer nú at taka kanningina í málinum ímóti Jonathan Motzfeldt uppaftur, soleiðis sum ríkisadvokaturin hevur kravt. Steen Thomsen, løgregluovasti í Grønlandi, sigur við KNR, at tey, sum eru uppi í málinum, verða avhoyrd av nýggjum, og farið verður í gongd við tað beinanvegin, sigur hann. Eins og ríkisadvokaturin leggur hann dent á, at kanningarnar skulu einans geva ákæruvaldinum grundarlag til at taka endaliga avgerð.

# kaldir í skúri...



*- Vit høvdu vitjan av eitt nú Jóannesi Eidesgaard, løgmanni og John Johannesen, løgtingsmanni, undan valinum. Løgmaður var heilt uppi á loftinum í skúrinum her hjá okkum, siga teir*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

útróðrarmenninar og egnararnar í Klaksvík.

- Eg haldi, at pensjónistar saktans kundu sloppið at egnt, sum teir vilja og verið skattaðir av inntøkuni sum øll onnur. Tað er órímiligt, at tað skal ganga útyvir veitingina hjá teimum fyri tað, um teir eru ágrýtnir og soleiðis kunnu hava eina hampiliga inntøku av egningini, tá ið árið er liðugt, sigur annar av egnarunum.



*Tað var bara ljós í einum av teimum mongu egningaskúrunum á Stongunum í morgun. Vit vóru framvið og fingu eitt lítið prát*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Tá ið ein stakur pensjónistur í eitt ár hevur egnt fyri slakar 116.000 krónur, er øll vi›bótin, sum annars er skattskyldug, fallin burtur*

*Mynd: Snorri Brend*

## Hví skulu tey eldru »sektast«?

**Ein pensjónistur, sum egnir fyri slakar 116.000 krónur um árið, missir alla viðbótina í fólkapensjónini, sum annars er 2.976 krónur um mánaðin**

EGNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Undan løgtingsvalinum hesaferð - eins og undan mongum øðrum valum - hava politikarar lagt dent á, at tað altíð skal loysa seg at arbeiða. Men er tað nú, at tað altíð loysir seg at arbeiða, kunnu vit spyrja. Tað veldst ivaleyst um eyguni, sum síggja og oyruni sum hoyra.

Kring um í egningarskúrunum í landinum finst ein blandingur av ungdómi, tilkomnum og eldri monnum, sum taka eina hond í og eisini stytta sær stundir í einum - kunnu vit siga - sera sosialum og gevandi umhvørvi.

Ofta hava vit hoyrt, at tað loysir seg ikki serliga væl hjá fólki at arbeiða, sum fáa almennar veitingar, tí hesi verða sektað, um tey arbeiða ov nógv.

Ein stakur pensjónistur kann tjena tilsamans 54.400 krónur um árið, áðrenn inntøkan - íroknað rentuinntøka - ávirkar viðbótina í pensjónini, sum er upp á 2.976 krónur um mánaðin.

Men fyri hvørjar 100 krónur, sum viðkomandi tjenar omanfyri hesar 54.400 krónurnar, minkar viðbótin við 40 krónum um árið.

Hetta merkir, upplýsir Almannastovan fyri Sosialinum, at tá ið ein pensjónistur í eitt ár hevur egnt fyri slakar 116.000 krónur, er øll viðbótin, sum annars er skattskyldug, fallin burtur.

Grundupphættin, sum verður goldin pensjónistinum, verður ikki skattað, og hon verður ikki ávirkað av, um pensjónisturin tjenar lítið ella nógv aftat pensjónini.

Spurningurin er so, um teir politikarar, sum afturvendandi tosa um, at tað altíð skal loysa seg at arbeiða, vilja hava hesi viðurskifti hjá pensjónistunum í huga, tá ið fólk aftur fara at sessast úti í Tinganesi - í einum nýggjum valskeiði við nógvum nýggjum fólkum á okkara háttvirda løgtingi.